# Karsten Hansen brýggjar seg ikki um at fáa í posa og sekk



- Tað ber illa til at biðja fakfeløg vísa hógv og samfelagssinni, samstundis sum vit sjálvir hækka okkara egnu lønir og okkara egnu eftirlønir munandi, sigur Karsten Hansen, talsmaður tjóðveldisfloksins í almennum lønarmálum

**– Tað er heilt burturvið at politikarar skulu hava betri pensjónir enn øll onnur í samfelagnum og tað, sum hendi í farnu viku, kunnu fólk ómguligt skilja, heldur Karsten Hansen**

EFTIRLØN TIL LANDSSTÝRISMENN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er heilt burturvið, at politikarar skulu hava eina nógv betri eftirlønarskipan enn øll onnur í samfelagnum.

Tað heldur Karsten Hansen, sum er formaður tjóðveldisfloksins í almennum lønarmálum.

Hann sigur, at politikarar eru ein partur í samfelagnum og teir eiga at vera solidariskir við øll hini í samfelagnum.

– Tí eiga politikarar heldur ikki at lóggeva niður í sín egna lumma og geva sær sjálvum eina eftirlønarskipan, sum er nógv betri enn nakar annar í samfelagnum hevur.

Karsten Hansen sigur, at tað var eisini orsøkin til at hann sýtti fyri at broyta eftirlønarviðurskiftini hjá landssýrismonnum, tá ið hann sjálvur sat á kassanum í fíggjarmálaráðnum og løgtingið hækkaði lønirnar og eftirlønirnar hjá løgtingsmonnum.

Og tað er eisini orsøkin til, at hann var ímóti, at løgtingið nú hækkaði eftirlønina hjá landsstýrinum, beint áðrenn tað fór í summarfrí.

Løgtingið hækkaði í farnu viku eftirlønina hjá landsstýrismonnum. Men tað varð gjørt við afturvirkandi kraft frá 1998 at rokna. Tað merkir, at allir landsstýrismenn, sum eru valdir síðani 1998 koma undir skipanina og hjá teimum landsstýrismonnum, sum sita nú, verður 1998 brúkt sum grundarlag.

Sostatt hevur eisini Karsten Hansen fingið ágóðan av hesum, tí hetta ger, at hansara egna eftirløn hækkar munandi.

-Tað irriterar meg út um alt mark, tí eg haldi at tað er skeivt. Tað er ílagi, at vit fáa løn í okkara arbeiði, men tá ið ið vit fara úr politikki, eru vit vanligir borgarar aftur á jøvnum føti við øll onnur. Og tá ið vit bjóða okkum fram í politikki, kenna vit treytirnar og tað er heilt órímiligt, at vit bøta um treytirnar aftaná, at vit eru komin upp í politikk til okkara egna fyrimun –og tað við afturvirkandi kraft afturat.

Annars hækkaði Løgtingið lønirnar hjá løgtingslimum síðst í nítiárunum, men Karsten Hansen sigur, at tað var ikki við hansara vilja, tí hann var ímóti tí.

Men nú kemur so eitt løgting fleiri ár seinni og sigur, at eg skal hava eftirløn fyri tey seks árini, eg havi sitið í Landsstýrinum og tað smakkar mær ómetaliga illa.

– Eg fái tað ikki at samsvara, at vit skulu biðja fakfeløg vísa hógv og samfelagssinni, samstundis sum vit sjálvir hækka okkara egnu lønir og okkara egnu eftirlønir munandi.

### Skulu hava skipað viðurskifti

Karsten Hansen ásannar, at vit skulu hava skipað viðurskifti á økinum og í so máta er tað rætt at javntseta eftirlønina hjá løgtingslimum og landsstýrismonnum.

– Men at lóggeva við afturvirkandi kraft til frama fyri seg sjálvan og ein heilt lítlan bólk í samfelagnum, er grundleggjandi skeivt.

Hann vísir á, at øll onnur í samfelagnum brúka yvir 30 ár av sínum arbeiðslívi til at koma upp á hægstu eftirløn.

– Tí dugi eg ikki at síggja nakað rímiligt í, at landsstýrismenn og løgtingsformaðurin skulu koma upp á fulla eftirløn longu eftir átta árum og vanligir løgtingsmenn eftir bara 16 árum.

– Sostatt hava politikarar eina munandi betri eftirlønarskipan enn nakar annar í samfelagnum og tað er heilt órímiligt at vit skulu hava ein nógv betri eftirlønarskipan enn tey, sum vit liva ímillum í samfelagnum.

Framsøgumaður tjóðveldisfloksins staðfestir eisini, at nógvir politikarar hava eina merkiliga støðu til spurningin um lønir og eftirlønir til politikarar.

– Tá ið spurningurin var uppi seinast fyri einum trimum árum síðani, beint áðrenn hendan samgongan kom til, legði Jóannes Eidesgaard dent á, at javnaðarflokkurin fór aldrin at hækka eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum, fyrrenn eftirlønirnar hjá øllum øðrum samfelagsbólkum var fingin í rættlag. Tá fall málið.

– Og tá ið lønirnar hjá løgtingslimum vórðu hækkaðar fyri einum átta árum síðani, var tað formansskapurin, sum legði uppskotið fyri Løgtingið. Men tá var tað eitt ófrávíkiligt krav frá sambandsfloksins umboði í formansskapinum, at tað skuldi ikki leggjast fram, fyrrenn allur formansskapurin varð samdur.

– Tað endaði eisini við, at formansskapurin varð samdur og eisini sambandsfloksins umboð skrivaði undir at leggja tað fram.

– Men tá ið sambandsflokkurin hevði tryggjað sær, at uppskotið kom á Løgting, spældi hann fríspæl og atkvøddi ímóti.

– Og nú málið um eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum var fyri í farnu viku, kundi sambandsflokkurin felt uppskotið vissi hann vildi, men hann atkvøddi blankt og syrgdi fyri, at tað varð samtykt, sigur Karsten Hansen.

---

# Politikarar skulu ikki sleppa at lóggeva niður í sín egna lumma

**Karsten Hansen heldur, at tað er skeivt at politikarar hava rætt til at áseta sínar egnu lønir. Hann mælir tí til, at ein serlig nevnd verður sett at finna útav, hvussu politikarir skulu lønast**

POLITIKARA-LØNIR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Karsten Hansen mælir til at ein serlig nevnd verður sett at útgreina, hvussu lønirnar hjá politikarum skulu ásetast í framtíðini*

– Tað er ikki rætt, at politikarar hava heimild til at áseta sína egnu løn.

Tað heldur Karsten Hansen, talsmaður fyri tjóðveldisflokkin í lønarmálum.

Hann heldur at tað er skeivt, at politikarar skulu hava tann framíhjá rætt fram um øll onnur í sam felagnum, at teir kunnu lóggeva um, hvussu lønir og eftirlønir hjá politikarum skulu vera.

Nú hava politikarar akkurát hækka eftirlønina hjá landsstýrismonnum við afturvirkandi kraft til 1998 og tað helvur talsmaður tjóðveldisfloksins vera eitt gott dømi um, hvussu óheppið tað er, at politikarar hava hendan rættin.

– Tað er vónleyst at fáa fólk at skilja slíka framferð, samstundis sum teirra egnu eftirlønarviðurskfti eru afturútsigld. Hetta kunnu fólk ikki skilja, leggur hann afturat.

Tí skjýtur Karsten Hansen upp, at ein serlig nevnd verður sett at finna útav, hvussu lønin hjá politikarum skal ásetast frá nú og frameftir.

– Vit áttu at latið tað farna verið farið og einans hugt frameftir, tí tað er ómøguligt at forsvara, at politikarar lóggeva til sín sjálvs við afturvirkandi kraft

Hann mælir tí til, at ein nevnd við einum umboði úr hvørjum flokki verður sett at útgreina málið og hendan nevndin skal so kunna kalla teir serfrøðingar á fund, sum hon hevur brúk fyri.

Hetta er tað, sum eitur ein grein 25 nevnd á politikaramáli.

Annars heldur hann, at tað er ymiskt at fáa í rættlag.

– Ein trupulleiki er, at tað er ásett við lóg at landsstýrismaður skal vera løntur í 38. lønarflokki. Tað merkir, at lønir er nokk so fastlæst og tað er skeivt.

Karsten Hansen sigur, at tað førir til, at nógv embætisfólk í almennu umsitingini eru betri lønt enn landsstýrisfólkini, sum hava evstu ábyrgdina.

–Tá ið eg kom í Landsstýrið, var tað bara aðalstjórin, sum fekk hægri løn enn eg sum landsstýrismaður. Men síðani samráddust tænastumenninir seg fram til betri løn og tá ið eg fór úr landsstýrinum vóru tað eini fimm, seks leiðarar í umsitingini, ið vóru betri løntur enn eg var, hóast eg hevði ovastu ábyrgdina.

– Somuleiðis hevur løgmansstjórin væl hægri løn enn sjálvur løgmaður, hóast løgmaður hevur evstu ábyrgdina og løgtingsstjórin hevur betri løn enn løgtingsformaðurin.

Hann heldur, at skal lønin ásetast eftir ábyrgdini, er hetta eitt sindur ivasamt og tí eigur ein nevnd at verða sett at fáa endaliga greiði á øllum hesum viðurskiftum.